

# Føroya Kærustovnur

## Ársfrágreiðing

# 2009



Ársfrágreiðingin 2009 hjá Føroya Kærustovnur
Umbróting, teknindi og liðugtgerð: ABELIT

Føroya Kærustovnur

Ársfrágreiðing

2009

## Innihaldsyvirlit


1. Endamálið við frágreiðingini . . . . . 4
2. Stutt lýsing av stovninum frá hann byrjaði fram til í dag . . . . . 5
3. Uppgávan hjá Kærustovninum . . . . . 5
4. Starvsfólk . . . . . 6
5. Fíggjarviðurskifti . . . . . 6
6. Virksemið í 2009 . . . . . 7
   6.1. Innkomnar kærur . . . . . 7
   6.2. Avgreiddar kærur . . . . . 8
   6.3. Nýtt virksemi í 2009 . . . . . 9
      6.3.1 Psykiatriska sjúklingakærunevndin . . . . . 9
      6.3.2 Fjølmiðlanevndin . . . . . 9
   6.4. Viðgerðartíðin . . . . . 9
   6.5. Viðmerkingar og niðurstøða um virksemið í 2009 . . . . . 10
7. Vit líta frameftir . . . . . 11
8. Ársfrágreiðingar . . . . . 11
9. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum . . . . . 12
10. Skatta- og avgjaldskærunevndin . . . . . 21
11. Kærunevndin hjá Stuðulsstovninum . . . . . 28
12. Kærunevndin í lendismálum . . . . . 30
13. Vinnukærunevndin . . . . . 34
14. Psykiatriska sjúklingakærunevndin . . . . . 40
15. Skuldarumskipanarnevndin . . . . . 44



Føroya Kærustovnur | Undir Hornabakka | Postsmoga 45 | 110 Tórshavn
Telefon 32 05 85 | Telefax 32 05 90 | www.kaerustovnur.fo



# 1. Endamálið við frágreiðingini

Kærustovnurin er skrivstova hjá nevndum, sum hoyra til ymisk ráð, Fíggjarmálaráðið, Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Mentamálaráðið, Vinnumálaráðið, og Innlendismálaráðið.

Frágreiðingar hava higartil verið gjørdar fyri virksemið hjá hvørjari nevnd sær, og hetta hevur havt við sær, at hvørt ráð bert hevur fingið frágreiðing um virksemið á tí øki, sum tann nevndin hoyrir til. Ætlanin er ikki at sleppa frágreiðingunum um virksemið hjá hvørjari nevnd sær, tí hesar viðgera nærri virksemið hjá júst tí nevndini í farna árinum.

Frágreiðingarnar siga tó onki um virksemið hjá Kærustovninum annars, og hetta kann hava við sær, at ráðini ikki hava fingið eina fatan av, hvat stovnurin annars tekst við. Tí er ætlanin, umframt vanligu frágreiðingarnar, at geva eina nærri lýsing av virkseminum hjá Kærustovninum í farna árinum. Vónandi fáa ráðini og tey, sum annars hava áhuga í hesum, á henda hátt innlit í, hvat uppgávan hjá stovninum er í mun til nevndirnar og fáa greiðu á, hvussu arbeiðið fer fram.

## 2. Stutt lýsing av stovninum frá hann byrjaði fram til í dag

Føroya Kærustovnur byrjaði virksemið sítt í 1998. Í byrjanini var stovnurin skrivstova hjá Kærunevndini í almannamálum, Landsskattakærunevndini, Tollkærunevndini og Meirvirðisgjaldskærunevndini.

Landsskattakærunevndin, Tollkærunevndin og Meirvirðisgjaldskærunevndin eru seinni lagdar saman til Skatta- og avgjaldskærunevndina, og Kærunevndin í almannamálum er víðkað til at taka sær av almanna- og heilsumálum.

Í 2000 gjørdist stovnurin skrivstova hjá Kærunevndini hjá Stuðulsstovninum, í 2005 hjá Skuldarumskipanarnevndini, í 2007 hjá Kærunevndini í lendismálum, í 2008 hjá Vinnukærunevndini og í 2009 hjá Fjølmiðlanevndini og Psykiatrisku sjúklingakærunevndini.

## 3. Uppgávan hjá Kærustovninum

Kærustovnurin tekur sær av skrivstovuvirkseminum hjá nevndunum. Stovnurin móttekur kærurnar, skrásetir tær, sendir tær til ummælis og hoyringar hjá avvarðandi myndugleikum og møguligum triðja pørtum. Tá málið er fult upplýst, verður løgfrøðiligt upprit við tilmæli til niðurstøðu gjørt, og verður hetta saman við skjalatilfarinum í málinum sent limunum. Innkallað verður til fundar, og tá kærunevndin hevur tikið avgerð, avgreiðir Kærustovnurin avgerðina til kærara og avvarðandi myndugleika.

Avgerðirnar hjá kærunevndunum verða síðan gjørdar navnleysar og lagdar út á avgerðarsavn á heimasíðu okkara. Eisini tekur stovnurin sær av samsýningina hjá nevndunum og av goymsluna av málunum hjá nevndini.

Eisini upplýsir og fyrireikar Kærustovnurin mál um skuldarumskipan til Skuldarumskipanarnevndina at taka støðu í. Hendan nevnd er ikki ein kærunevnd, men tekur nevndin beinleiðis støðu til umsóknirnar.

Arbeiði fyri Fjølmiðlanevndina er avmarkað til skrivstovuvirksemið hjá nevndunum tvs. skráseting av kærum, innheintan av upplýsingum, innkalling til fundar o.s.fr., men umfatar t.d. ikki løgfrøðiligt upprit.

# 4. Starvsfólk

Á Kærustovninum eru stjóri, 3 løgfrøðingar og 3,3 skrivstovufólk.




# 5. Fíggjarviðurskifti

Játtanin til stovnin í 2009 var kr. 4.797.000 + eykajáttan á kr. 300.000 = kr. 5.097.000. Harumframt hevur stovnurin fingið kr. 75.000 frá Innlendismálaráðnum til samsýning og skrivstovuarbeiði í samband við Fjølmiðlanevndina. Harumframt er rindað kr. 26.000 í gjaldi fyri kæruviðgerð í samband við Vinnukærunevndina í 2009. Kr. 2.000 av hesum eru afturrindaðar, tí viðkomandi kæra varð avvíst. Viðmerkjast skal, at nevndirnar verða samsýntar av játtanini hjá Kærustovninum.

# 6. Virksemið í 2009

## 6.1 Innkomnar kærur

Í 2009 móttók Kærustovnurin 436 nýggjar kærur. Til samanberingar kann nevnast, at innkomna talið av kærum í 2008 var 380 og í 2007 vóru innkomnu kærurnar 266 í tali.

Sum myndin eisini vísir, er innkomna talið av kærum soleiðis vaksið munandi seinastu árini. Myndin vísir eisini, at flestar kærur eru innan almanna- og heilsumál og skatta- og avgjaldsmál. Staðfestast kann eisini, at tað er á almanna- og heilsuøkinum, at mongdin av innkomnum kærumálum er vaksin mest í 2009 í mun til árið frammanundan, og eru einar hálvtrýss fleiri kærur móttiknar hetta árið.




Tað er ongin loyna at ein rímiliga stórur bólkur av kærunum innan skatta- og avgjaldsmál árini 2009 og 2008 eru nakað líkar og tí løgfrøðiliga ikki so truplar. Hóast hetta, so skulu allar hesar kærur gjøgnum somu mannagongd, sum einhvør onnur kæra við skráseting, innheinting av skjølum, hoyring o.s.fr. Arbeiðsbyrðan av hesum málum er tí líka stór fyri skrivstovuna, sum eitthvørt annað mál og hava fylt nógv hetta árið.
Samstundis sum mongdin av kærum er vaksin, er virkisøkið hjá stovninum eisini nógv víðkað. Umframt almanna- og heilsumál, skatta- og avgjaldsmál, stuðulsmál, skuldarumskipanarmál og lendismál fevnir virksemið nú eisini um vinnumál og mál um tvingsul í psykiatriini.

Starvsfólkatalið er hinvegin ikki økt samsvarandi, og hetta hevur sjálvandi við sær, at somu starvsfólk ikki bara skulu avgreiða fleiri og fleiri mál, men eisini, at tey skulu hava eina nógv breiðari vitanarflatu enn frammanundan, tá øki ikki var so breitt. Hetta gongur bara til eitt vist. Tað er neyðugt, at starvsfólkini hava møguleika fyri at fylgja við á einstøku økjunum og eisini seta seg inn í nýggj øki og nýggja lóggávu og fylgja við, so málini verða fyrireikað so væl sum gjørligt, og nevndirnar verða serviceraðar á fullgóðan hátt.

## 6.2 Avgreiddar kærur




Sum tað sæst vórðu munandi fleiri mál avgreidd í 2009 enn árini frammanundan. Heili 489 mál vórðu avgreidd í 2009. Til samanberingar kann nevnast, at 257 mál vórðu avgreidd í 2008 og 264 í 2007.

Tað hevur bert borið til at avgreiða so nógv mál í 2009, tí vit hava havt sum fyrsta prioritet at avgreiða so nógvar kærur sum gjørligt so skjótt sum gjørligt. Umframt dagliga arbeiðið hava vit havt serligar verkætlanir, har starvsfólk hava átikið sær eyka arbeiði fyri at fáa fleiri mál ígjøgnum, og eisini hava serlig átøk verið framd í samstarvi millum løgfrøðingar og skrivstovufólk.

Ein avleiðingin av eini slíkari prioritering er, at mál hava ikki verið avgreidd í tí tíðarrøð, tey eru innkomin. Heldur hava kærur, har tað eru fleiri, sum líkjast og mál, sum kanska ikki eru so trupul løgfrøðiliga, verið tikin framum. Truplari málini og mál, sum taka drúgvari tíð, t.d. tí viðkomandi skal seta seg inn í nýtt øki, eru ofta sett afturum í røðina. Nevnast kann, at av avgreiddu málunum vóru á leið 200 um mvg av skrásetingargjaldi.

Ein onnur avleiðing er, at avgerðarsavn okkara hevur verið niðurraðfest. Kærustovnurin hevur heimasíðu, har vit leggja navnleysar avgerðir hjá nevndunum út. Hetta arbeiðið skal helst gerast so skjótt sum gjørligt eftir hvønn fund. Men her hava vit verið langt afturúr í 2009 og eru enn ikki komin undir land við hesum arbeiði.

Umframt eru aðrar fyrisitingarligar uppgávur, sum liggja á láni. Uppgávur, sum eisini eru týdningarmiklar, men sum ikki merkjast uttanfyri stovnin.

## 6.3 Nýtt virksemi í 2009

### 6.3.1 Psykiatriska sjúklingakærunevndin

Frá 1. oktober 2009 bleiv Kærustovnurin skrivstova hjá nýggjari kærunevnd, jbr. Anordning nr. 185 af 13. mars 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien. Umframt at Kærustovnurin er skrivstova hjá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini, hevur stovnurin til uppgávu at seta í starv sjúklingaráðgevar, upplæra teir um viðkomandi lógarverk og lógarbroytingar á økinum umframt arbeiðsuppgávur og skyldur og at hava umsitingina av sjálvari skipanini um hendi.

Vit hava brúkt nakað av tíð í 2009 til fyrireiking av psykiatrisku sjúklingakærunevndini og til setan og upplæring av sjúklingaráðgevum.

### 6.3.2 Fjølmiðlanevndin

Kærustovnurin gjørdist frá 1. januar 2009 skrivstova hjá Fjølmiðlanevndini. Men munurin á hesi uppgávuni í mun til hinar nevndirnar, sum stovnurin er skrivstova hjá, er, at vit gera ikki løgfrøðilig upprit til nevndina. Uppgávan fevnir um at innheinta upplýsingar, senda skjøl til hoyringar, innkalla til fund o.s.fr. Kærustovnurin ger heldur ikki ársfrágreiðing um virksemið hjá nevndini.

## 6.4 Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin er ymisk fyri nevndirnar og liggur frá 4½ mánaða til 7½ í miðal í 2009. Viðgerðartíðin er longd á øllum økjum í 2009 í mun til árið frammanundan.

## 6.5 Viðmerkingar og niðurstøða um virksemið í 2009

Árið er merkt av einum so høgum kærutali sum ongantíð áður. Bæði talið av innkomnum kærum og talið av avgreiddum kærum hevur verið óvanliga høgt hetta árið.

Samstundis sum mongdin av kærum er vaksin, er virkisøkið hjá stovninum eisini nógv víðkað. Umframt almanna- og heilsumál, skatta- og avgjaldsmál, stuðulsmál, skuldarumskipanarmál og lendismál fevnir virksemið nú eisini um vinnumál og mál um tvingsul í psykiatriini.
Starvsfólkatalið er hinvegin ikki økt samsvarandi, og hetta hevur sjálvandi við sær, at somu starvsfólk ikki bara skulu avgreiða fleiri og fleiri mál, men eisini, at tey skulu hava eina nógv breiðari vitanarflatu enn frammanundan, tá økið ikki var so breitt.

Neyðugt hevur tí verið við eini raðfesting, og hetta árið hava vit sum áður nevnt raðfest soleiðis, at avgreiddar vóru so nógvar kærur sum gjørligt so skjótt sum gjørligt. Atlitið aftan fyri hesa raðfesting var, at so nógvir borgarar sum gjørligt fingu sína niðurstøðu sum skjótast. At avgerðarsavnið ikki er dagført, og aðrar innanhýsis uppgávur liggja á láni, er ikki nakað, sum borgarin merkir so væl.

Leggjast kann afturat, at hóast raðfestingina, sum vit hava gjørt, so er viðgerðartíðin longd á øllum økjum hetta árið. Hetta er ikki nøktandi, og tað gongur heldur ikki í longdini, at innanhýsis uppgávur liggja og hópa seg upp, og nóg mikið av tíð ikki er til tey truplaru málini, eftirútbúgving, vegleiðingar v.m.

Tað er tí greitt, at neyðugt er við fleiri starvsfólkum til at taka sær av teimum uppgávum, sum stovnurin hevur, og í 2010 er ætlanin at víðka um starvsfólkatali.

# 7. Vit líta frameftir

Í samband við at fleiri áheitanir hava verið á Kærustovnin um at átaka sær fleiri uppgávur, hava vit í samráð við Innlendismálaráðið sett í verk eina kanning av ætlanum um at leggja nýggj øki til Kærustovnin. Út frá hesum vænta vit, at ein skipað ætlan kann gerast fyri stovnin, nær og hvørji øki stovnurin skal taka sær av framyvir. Hetta út frá tí fyriliti, at talan er um ein lítlan stovn, og nýggj øki tí eiga at verða tikin inn við umhugsni, so verandi øki ikki líða undir hesum.



# 8. Frágreiðingar

Hjálagdar eru frágreiðingarnar um virksemið í 2009 hjá nevndunum, sum Kærustovnurin er skrivstova hjá. Fjølmiðlanevndin er tó undantikin, tí á hesum øki er tað ikki Kærustovnurin, men nevndin sjálv, sum ger frágreiðing um virksemið.

# 9. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum

## 9.1 Nevndin

Í kærunevndini í almanna- og heilsumálum sita:

- Sigmund Poulsen, advokatur og formaður
- Annika Olsen, lækni
- Karin Kjølbro, sosialráðgevi

## 9.2 Viðgerðarøkið

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum viðger kærur um:

- Avgerðir hjá Almannastovuni
- Avgerðir hjá Nærverkinum (Heimarøktin og Serforsorgin) eftir forsorgarlógini
- Avgerðir hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi
- Avgerðir hjá kommunustýrinum um barna- og ungdómstannarøkt
- Avgerðir eftir barnaverndarlógini, sum ikki kunnu kærast til høvuðsbarnaverndarnevndina
- Avgerðir eftir lóg um eldrarøkt á Sandoynni



## 9.3 Frágreiðingin fyri Kærunevndini í almanna- og heilsumálum 2009

"Viðvíkjandi kærugongdini á almanna- og heilsuøkinum í 2009.

Kærustovnurin hevur nú gjørt upp tøl okkara fyri kærugongdina á almanna- og heilsuøkinum í 2009.

Móttiknar kærur:
Í 2009 vórðu móttiknar 184 nýggjar kærur móti 133 kærum í 2008. Innkomna talið av kærum hetta árið er soleiðis munandi hægri enn árið frammanundan.
Kærurnar vóru av hesum slagi:

- Forsorgarlógin ............ 80
- Fyritíðar- og fólkapensjón, ískoyti, afturgjaldskrøv v.m. ............ 34
- Fyritíðarpensjón, tillutan / hækkan ............ 30
- Samsýning at ansa eldri og óhjálpnum heima ............ 1
- Barnaverndarlógin ............ 3
- Barnagjaldslógin ............ 3
- Dagpeningalógin ............ 12
- Nærverkið ............ 2
- Sjúkrahúsverk ............ 16
- Innlit ............ 3

Í alt ............ 184

Virksemið í 2009:
Kærunevndin í almanna- og heilsumálum helt 10 fundir í 2009 og tók avgerð í tilsamans 153 málum í mun til 123 í 2008. Av hesum vóru 5 kærumál viðv. avgerðum hjá sjúkrahúsverkinum.

Kærumálini, sum vórðu avgjørd í 2009, vóru av hesum slagi:

- Forsorgarmál ............ 65
- Fyritíðar- og fólkapensjónsmál, ískoyti, afturgjaldskrøv v.m. ............ 31
- Fyritíðarpensjónsmál, tillutan,hækkan ............ 30
- Dagpeningamál ............ 12
- Heilsumál ............ 5
- Barnaverndar- og barnagjaldsmál ............ 5
- Nærverkið ............ 4
- Innlit ............ 1

Í alt: ............ 153

Av teimum 153 kærumálunum, sum vórðu avgreidd í 2009, vóru :

| | | |
|---|---|---|
| • Frá 2009 : | 96 | (63%) |
| • Frá 2008 : | 57 | (37%) |
| Í alt: | 153 | (100%) |

## Sjúkrahúsverkið: 5 mál

| | 2009 | 2008 |
|---|---|---|
| • Avgerð staðfest: | 2 | 4 |
| • Broytt: | 0 | 0 |
| • Heimvíst: | 3 | 0 |
| • Burturfallin: | 0 | 2 |
| Í alt: | 5 | 6 |

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum hevur heimild at viðgera avgerðir hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi. Nevndin kann sostatt kanna, um rættarligir og fyrisitingarligir feilir eru framdir. Kannað verður, um tær fyrisitingarligu og rættarligu skipanir eru fylgdar, t.d. um givnar eru grundgevingar, sum svara til ásetingarnar í fyrisitingarlógini v.m. Kærunevndin skal ikki taka støðu til sjálva sjúkuviðgerðina, tí hetta er ein heilsufakligur spurningur, ið fellur uttanfyri heimildina hjá Kærunevndini.

Nevnast kann, at 16 kærur vórðu móttiknar í 2009. Hetta eru nógv fleiri enn í 2008, tá bert 3 kærur vórðu móttiknar. Hugsast kann, at ein av orsøkunum er, at Visitatiónsnevndin hevur ásett nýggjar leiðreglur.
3 av avgreiddu málunum vóru um noktan av fylgjara og 2 mál snúðu seg um gjald fyri viðgerð uttanlands.
Vísast skal á, at allarflestu avgerðirnar, ið verða tiknar av sjúkrahúsverkinum, verða fráboðaðar borgaranum munnliga. Hetta er óheppið, tí í fyrsta lagi er ivasamt, um borgarin fær nøktandi kæruvegleiðing, og í øðrum lagi er trupult hjá borgaranum at vita, hvat grundarlagið var fyri avgerðini, og harvið kanna, um avgerðin er í tráð við lógargrundarlagið.
Í kærumálunum hevur samskiftið við sjúkrahúsverkið annars gingið væl, men ummælini av kærumálunum kundu komið skjótari og verið betur. Ummælini nema sjáldan við teir relevantu fyrisitingarligu og løgfrøðiligu spurningarnar í málunum.

Miðal viðgerðartíðin var knappar 5 mánaðir roknað frá tí, at kæran kom inn, og til hon var avgreidd. Miðal viðgerðartíðin er longri enn í 2008, tá hon var 4 ½ mánaðir. Viðgerðartíðin verður mett at vera í longra lagi fyri hetta slagið av málum.

Viðmerkingar.
Í ársfrágreiðingini fyri 2007 viðmerkti Kærustovnurin viðvíkjandi økinum fyri sjúkrahúsverkið, at ein avgerandi og týðandi mangul fyri økið var, at ongar leiðreglur vóru gjørdar av visitatiónsnevndini smb. § 10 í sjúkrahúsverkslógini fyri, nær fylgjarir kunnu ávísast sambært § 7, stk. 2 í í kunngerðini um gjald fyri ferða-, uppihalds- og kostútreiðslur til sjúklingar.

Leiðreglurnar eru nú gjørdar og eru komnar í gildi. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum hevur brúkt hesar leiðreglur í samband við viðgerð av einari kæru í 2009, og vart skal longu nú gerast við, at leiðreglurnar ikki eru greiðar, og at tað er sera torført at fastleggja nýtsluøkið hjá hesum leiðreglum. Ein orsøk til hetta er, at leiðreglurnar ikki áseta tey atlit, sum eru avgerandi fyri, nær fylgjari kann ávísast, men heldur í stóran mun vísa á ítøkiligar støður, har fylgjari kann ávísast. Leiðreglurnar eru ikki úttømandi, og tað er tí neyðugt at kenna tey avgerandi atlitini fyri at ávísa fylgjara, um nýtsluøkið skal fastleggjast. Vísast kann eisini á, at nýtsluøkið hjá



leiðreglunum í stóran mun verður ásett við at vísa á, nær fylgjari ikki kann ávísast heldur enn at áseta, nær fylgjari kann ávísast. Tað vil siga, at nýtsluøkið verður avmarkað negativt, og neyðugt er at enda øvugt frá ásetingunum fyri at avgera, um fylgjari kann ásetast. Spurnartekin kann tó setast við, um tær niðurstøður, sum komið verður til við hesum, eru í tráð við ætlaninar hjá Heilsumálaráðnum.

Vart skal eisini gerast við, at vandi er fyri, at tann praksis, sum verður eftir leiðreglunum, verður í stríð við lógina um sjúkrahúsverkið. Sambært § 9 í lógini um sjúkrahúsverkið er ávísing av fylgjara treytað av, at sjúklingurin vegna sjúku, brek/ófullføri ikki er førur fyri at ferðast einsamallur til viðgerðarstaðið. Lógarkarmurin fyri, nær fylgjari kann ávísast, er soleiðis ógvuliga trongur. Tað er innan fyri hendan karmin, at leiðreglurnar skulu takast í brúk og áseta, nær talan er um heilt serlig viðurskifti, jb. § 7 í kunngerðini um gjald fyri ferða-, uppihalds- og kostútreiðslur til sjúklingar.

Tað framgongur tó ikki greitt av leiðreglunum, at ávísing af fylgjara eftir leiðreglunum er treytað av, at sjúklingurin vegna sjúku, brek/ófullføri ikki er førur fyri at ferðast einsamallur til viðgerðarstaðið, og vandi er tí fyri, at tann praksis, sum verður eftir leiðreglunum, verður í stríð við lógina um sjúkrahúsverkið.

Sum dømi kann nevnast, at fylgjari kann ávísast sambært leiðreglunum, um sjúklingur, sum hevur krabbamein, skal á sjúklingaferð til útlandið, har hann møguliga fær ring boð um heilsustøðu sína. Sambært § 9 í lógini um sjúkrahúsverkið er ávísingin av fylgjara undir øllum umstøðum treytað av, at sjúklingurin av heilsuávum ikki er førur fyri at ferðast einsamallur. Um atlit ikki verður tikið til hesa áseting í lógini um sjúkrahúsverkið, kann tað henda, at fylgjari í tí nevnda døminum verður ávístur, hóast sjúklingurin er førur fyri at ferðast einsamallur.

Grundað á omanfyristandandi verður heitt á Heilsumálaráðið um at endurskoða lógargrundarlagið á økinum og í øllum førum at gera einfaldari reglur fyri, nær fylgjari kann ávísast sambært § 7, stk. 2 í kunngerðini, har víst verður á tey atlit, sum eru avgerandi fyri, nær ein fylgjari kann ávísast.

Almannastovan: 138 mál

| | 2009 | % | 2008 | % | 2007 | % | 2006 | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| • Avgerð staðfest | 88 | (66) | 63 | (66) | 85 | (68) | 72 | (36) |
| • Broytt | 14 | (10,5) | 8 | (8) | 22 | (18) | 27 | (25) |
| • Heimvíst | 5 | (4) | 6 | (6) | 10 | (8) | 10 | (12) |
| • Burturfallið | 26 | (19,5) | 19 | (20) | 8 | (6) | 24 | (27) |
| • Avvíst | 0 | - | 1 | - | 15 | - | 16 | - |
| • Frávik frá kærufreist | 5 | - | 12 | - | 2 | - | - | - |
| • Formalia | - | - | - | - | - | - | 1 | - |
| • Uppafturtøka noktað | - | - | 2 | | | | | |
| Í alt: | 138 | | 111 | | 142 | | 150 | |

Í uppgerðini fyri 2009 er í mun til % fyri 2009 sætt burtur frá 5 málum um kærufreist; % er tí roknað út frá 133 avgerðum.

Avgreiðslubýtið av teimum 148 kærunum í mun til lógarøkini:

Forsorgarmál, 62 avgerðir:

| (3 kærufreist) | | ( % ) |
|---|---|---|
| • staðfestar | 46 | (74) |
| • broyttar | 3 | (5) |
| • heimvístar | 3 | (5) |
| • burturfalnar | 10 | (16) |
| Í alt | 62 | |

Fyritíðar- og fólkapensjónsmál, ískoyti, afturgjaldskrøv v.m., 30 avgerðir:

| (1 kærufreist) | | ( % ) |
|---|---|---|
| • staðfestar | 17 | (56) |
| • broyttar | 5 | (16) |
| • burturfalnar | 8 | (27) |
| Í alt | 30 | |

Fyritíðarpensjónsmál, tillutan, hækkan, 29 avgerðir::

| ( 1 kærufreist ) | | ( % ) |
|---|---|---|
| • staðfestar | 18 | (62) |
| • broyttar | 4 | (14) |
| • heimvístar | 2 | (7) |
| • burturfalnar | 5 | (17) |
| Í alt | 29 | |

Dagpeningalógin, 12 avgerðir:

| | | ( % ) |
|---|---|---|
| • staðfestar | 7 | (58) |
| • broyttar | 2 | (17) |
| • burturfalnar | 3 | (25) |
| Í alt | 12 | |




Innihaldið í kærunum:

Forsorgarmál: Kærumálini á forsorgarøkinum eru sera ymisk og fevna m.a. um uppihaldshjálp, stakútreiðslur, meirútreiðslur og ymisk sløg av hjálpartólum, herundir tannviðgerð og bústaðarútreiðslur. Mál, sum flest vóru av eftir forsorgarlógini hetta árið, vóru 19 kærumál um endurbúgving, 15 kærumál viðv. stakútreiðslum, 14 kærumál viðv. meirútreiðslum í sambandi við brekað barn og 11 kærumál um hjálpartól.

Kærumálini viðvíkjandi endurbúgving snúgva seg í flestu førum um, at kærarin metir seg hava rætt til eina ávísa ella nýggja útbúgving, aftaná at hann hevur fingið ein skaða ella sjúku, og tí ikki fær hildið fram í sínum vanliga starvi ella yrki. Tað hevði lætt um hjá bæði borgarum, Almannastovuni og Kærunevndini, um nærri reglur innan hetta økið vórðu gjørdar.

Kærumálini viðvíkjandi meirútreiðslum í sambandi við barn, ið ber brek snúgva seg um sera ymiskar útreiðslur. Nevnast kunnu sum dømi útreiðslur í samband við ferðing og útreiðslur til skeið uttanlanda fyri foreldur. Eisini innan hetta økið verður mett, at tað hevði lætt um hjá øllum pørtum, um nærri reglur komu innan hetta økið.

Kærumálini um hjálpartól (hjálparráð) eru í ár m.a. um teldur, sum verða brúktar sum hjálpartól, el-koyristól og ymiskt innbúgv til fólk, sum búgva á stovni. Eisini eru kærur, har fólk ynskja t.d. venjingaramboð og aðrar brúkslutir sum hjálparráð. Hin 1. apríl 2010 kemur nýggja §18b, og fer hetta allarhelst at hava við sær, at reglurnar innan hetta økið verða greiðari, og at tað so ikki fara at verða so nógv mál innan hetta økið.

Forsorgarlógin § 32c stuðulsfólkaskipanin.
Aftur í ár hava verið nøkur kærumál innan hetta økið. Tað er trupult at avgreiða hesi mál nøktandi, tí ongar nærri reglur eru galdandi innan hetta økið. Greinin kom í gildi 1. januar 2006, og í § 32c, stk. 2 er ásett, at landsstýrismaðurin skal áseta nærri reglur um, hvussu skipanin skal virka, hvør kann nýta skipanina, og hvørji stuðulstiltøk eru fevnd av skipanini. Hóast 4 ár eru liðin, er eingin kunngerð komin, men vónandi verður hetta skjótt, so borgarin kann fáa kunnleika til, hvussu hetta økið skal fyrisitast.

Málsviðgerðin.
Í mun til tølini fyri 2008 eru tølini í 2009 á leið á sama støði í samlaðu málsviðgerðartølunum hjá Almannastovuni.
Í 2009 fullu 19,5% av kærunum burtur, áðrenn Kærunevndin hevði tikið støðu til kæruna. Kærur, sum falla burtur, eru í høvuðsheitum kærur, sum verða tiknar aftur, tí Almannastovan í samband við kæruviðgerðina hevur endurskoðað málið og er komin til annað úrslit t.v.s broytt ta upprunaligu avgerðina, sum varð kærd. Kærustovnurin sær tað sum eina positiva gongd, at Almannastovan leggur seg eftir sjálv at endurskoða sínar avgerðir, tá tær eru kærdar, m.a. tí Almannastovan á hendan hátt eisini skjótari tillagar avgerðir sínar í mun til nýggjar avgerðir frá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum.
Fyri alt økið hjá Almannastovuni undir einum er talið av staðfestingum tað sama í 2009 sum í 2008, nevniliga 66%. Verða burturfalnu kærurnar uppá 19,5% eisini roknaðar við í positiva partin hjá Almannastovuni (hetta eru oftast mál, sum Almannastovan hevur fingið rættað uppá undir viðgerðini), so verður staðfestingarprosentið í 2009 85,5% afturímóti 86% í 2008, so har er næstan ongin munur.
Í mun til ymisku lógarøkini so sæst, at fyri forsorgarmálini vórðu 74% av málunum staðfest. Í dagpeningamálunum vóru staðfestingarnar 58%, í pensjónsmálunum vóru 56% staðfestingar, og fyri fyritíðarpensjónsmálini 62%. Verða burturfalnu málini tikin við, so eru 16% av forsorgarmálunum burturfallin, 25% av dagpeningamálunum, 27% av pensjónsmálunum og 17% av fyritíðarpensjónsmálunum. Hetta gevur eitt samlað tal av staðfestingum, sum fyri forsorgarøkið er 90%, fyri dagpeningaøkið 83%, fyri pensjónsøkið 83% og fyri fyritíðarpensjónsøkið 79%.
Hetta vísir, at samlaða prosenttalið fyri tey ymisku økini er millum 79% - 90%, tvs. at staðfestingar- og burturfalstíttleikin fyri ymisku økini er rímiliga eins við einum sveiggi uppá uml. 11% point. Hetta er verri enn í 2008, tá staðfestingar- og burturfalstíttleikin fyri ymisku økini lá millum 83% - 92%, tvs. við einum sveiggi uppá uml. 9% point.
Avgerðirnar, sum verða broyttar ella heimvístar, mynda tey mál, sum ikki eru nøktandi viðgjørd. Hetta er fyri alt økið undir einum tilsamans 14,5% av málunum (broytt avgerð 10,5% + heimvíst 4%). Til samanberingar kann sigast, at í 2008 vórðu 14% av kærumálunum hjá Almannastovuni broytt ella heimvíst.
Uppgerðin sýnir sostatt, at fyri alt økið undir einum er støðan tann sama sum í 2008.
Í mun til ymisku lógarøkini so sæst, at fyri forsorgarmálini vórðu 10% av málunum broytt ella heimvíst. Fyri dagpeningamálini vóru broytingar og heimvísingar 17%, fyri pensjónsmálini 16% og fyri fyritíðarpensjónsøkið 21%.



Viðgerðartíðin

Um hugt verður eftir samlaða talinum av avgreiddum málum frá Almannastovuni, er miðal viðgerðartíðin knappar 6 mánaðir fyri hesi mál. Viðgerðartíðin verður roknað frá tí, kæran er innkomin, til hon er avgreidd frá nevndini. Miðal viðgerðartíðin er munandi longri enn í 2008, tá miðal viðgerðartíðin varð 3½ mánaða fyri hesi mál. Viðgerðartíðin er ikki nøktandi fyri hetta slagið av málum og stremba verður eftir at stytta um hesa komandi ár.

Um hugt verður eftir málsviðgerðartíðini innan tey ymisku lógarøki, har tey flestu mál eru, er miðal viðgerðartíðin soleiðis: forsorgarmál 129 dg., dagpeningamál 159 dg., fyritíðar- og fólkapensjónsmál, ískoyti v.m. 174 dg. og fyritíðarpensjón tillutan / hækkan 213 dg.

Mál um tillutan ella hækkan av fyritíðarpensjón hava eina miðal viðgerðartíð uppá góðar 7 mánaðir. Hetta kemst av, at hesi málini eru drúgv at viðgera, og ein liður í viðgerðini er, at málið verður sent til læknaráðgevan hjá Kærunevndini til læknafakliga metan.

Í kærumálunum hevur samskiftið við Almannastovuna annars gingið væl, og í flestu førum hava vit fingið umbidnu upplýsingarnar innan rímiliga tíð.

## Kommunurnar: 5 mál

Barnaverndarlógin (almannamál): 2 kærumál vórðu avgreidd eftir barnaverndarlógini. 1 varð heimvíst og hitt varð avvíst. Avgreidda talið av kærum er nakað lægri enn árið frammanundan, tá avgreidda talið av kærum eftir barnaverndarlógini var 6 mál.
Lóg um barnagjald: 3 kærumál vórðu avgreidd, 1 varð staðfest, 1 broytt og 1 fall burtur.

## Nærverkið: 4 mál

Nærverkið (Heimarøktin og Serforsorgin).
Avgerðir hjá Nærverkinum sambært forsorgarlógini §§ 32a og 32b um heimahjálp og stuðul til vaksin heimabúgvandi yvir 18 ár kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum.
4 mál vórðu avgreidd á hesum øki í 2009, 2 mál vórðu staðfest og 2 mál fullu burtur.
Í 2008 varð einki kærumál innan hetta økið avgreitt.

Niðurstøða:
Virksemið hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum fyri 2009 vísir, at miðal viðgerðartíðin er longd í 2009 í mun til árið frammanundan. Longda viðgerðartíðin stendst av, at Kærustovnurin hevur fingið nýggj øki at umsita, men ikki fleiri starvsfólk. Eingin løgfrøðingur situr nú burturav við almanna- og heilsumálum, og eisini eru nógv fleiri kærur móttiknar í 2009 enn árið frammanundan. Alt hetta hevur við sær, at viðgerðartíðin er vorðin drúgvari. Viðgerðartíðin er heilt greitt ikki nøktandi, og Kærustovnurin hevur gjørt nøkur serlig átøk í 2009 fyri at fáa mest møguligt av gomlu málunum avgreidd, og sæst hetta eisini í hagtølunum, har talið av avgreiddum málum øktist frá 123 málum í 2008 til 153 mál í 2009. Hetta hevur tó ikki verið nógmikið fyri at halda viðgerðartíðina á einum nøktandi støði og stremba verður eftir at fáa viðgerðartíðina stytta aftur komandi ár.
Kærutølini fyri sjúkrahúsverkið (5), Nærverkið (4) og barnaverndar- og barnagjaldslógina (5) eru so lág, at hesi ikki kunnu roknast at geva eina rættvísandi mynd av viðgerðini annars á hesum økjum.
Tølini fyri Almannastovuna sýna, at serliga materiella málsviðgerðin hjá Almannastovuni er á nøkunlunda sama støði sum í 2008. Staðfestingarprosentið í 2009 var 66% og sostatt tað sama sum í 2008. Verða tær burturfalnu kærurnar taldar við, kemur staðfestingarprosentið í 2009 upp á 85,5% afturímóti 86% í 2008.
Viðv. formligu málsviðgerðini hjá Almannastovuni sæst, at í 2009 vóru 4% av kærunum heimvístar. Hetta er minni enn í 2008, og hetta má roknast at vera á leið, men sjálvsagt eigur altíð at vera roynt at bøta um formligu málsviðgerðina, soleiðis at borgarin sum skjótast kann fáa røttu avgerðina.
Kærustovnurin heldur, at umframt, at Almannastovan seinastu árini sjálv hevur lagt seg eftir at betra um málsviðgerðina, so er ein orsøk til betring av materiellu málsviðgerðini hjá Almannastovuni, at greiðari lógarheimildir og kunngerðir eru gjørdar seinastu árini. Hetta ger tað lættari hjá Almannastovuni at umsita lógirnar og lættari at taka rættar avgerðir.
Og framhaldandi er tað tí so, at ásetan av greiðum lógarheimildum og gerð av kunngerðum fyri øll lógarøkir er avgerandi fyri, at Almannastovan kann umsita lógirnar rætt, og tað er eisini ein týðandi táttur í arbeiðnum hjá Almannastovuni at kunna bøta um materiellu málsviðgerðina. Hetta er eisini ein fyritreyt fyri, at Kærunevndini kann gera sítt eftirlitsarbeiði til fulnar.”



# 10. Skatta- og avgjaldskærunevndin

## 10.1 Nevndin

Í Skatta- og avgjaldskærunevndini sita:

- Turið D. Hentze, advokatur og formaður
- Rannvá Sólheim, løgfrøðingur
- Kaj Johannesen, cand. merc.
- Pauli Klakkstein, maskinmeistari
- Niclas Joensen, civiløkonomur HD

## 10.2 Viðgerðarøkið

Skatta- og avgjaldskærunevndin viðger kærur um:

- Avgerðir hjá TAKS um skatt, toll og meirvirðisgjald
- Avgerðir hjá Akstovuni um avgjald við skrásetingargjald á motorakførum

## 10.3 Frágreiðingin fyri Skatta- og avgjaldskærunevndina í 2009

"Viðvíkjandi kærugongdini á skatta- og avgjaldsøkinum í 2009.

Kærustovnurin hevur gjørt upp tølini fyri virksemið hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini fyri 2009 og fer her at geva sína frágreiðing.

Móttiknar kærur:
Í 2009 móttók Kærustovnurin 161 nýggjar kærur innan skatta- og avgjaldsøkið.

Kærurnar vóru av hesum slag:

| | |
|---|---|
| • Skattur | 37 |
| • MVG og onnur avgjøld | 124 |
| Í alt | 161 |

37 av hesum kærum vóru innan skattaøkið, og 124 kærur vóru innan avgjaldsøkið. Sum árið frammanundan var talið av innkomnum kærum óvanliga stórt í 2009, og aftur var størsti parturin av kærum um mvg av skrásetingargjaldi.

Í 2007 var innkomna talið av kærum 43. Í 2008 var talið 160 (harav 118 kærur um mvg av skrásetingargjaldi). Tað vil siga, at verður sæð burtur frá málum um mvg av skrásetingargjaldi, er gongdin í innkomnum málum tann sama sum árini frammanundan.

Virksemið í 2009:
Skatta- og avgjaldskærunevndin hevði hetta árið 9 fundir og avgreiddi 236 mál. Talið av avgreiddum kærum í 2008 og 2007 var ávikavist 57 og 34 mál. Talið av avgreiddum málum var soleiðis nakað væl hægri í 2009 enn árini frammanundan. Størsti parturin av avgreiddum málum vóru um mvg av skrásetingargjaldi.

Kærumálini, sum vórðu avgreidd í 2009, býttu seg eftir evni soleiðis:

- Skattur ........................................ 11
- Stuðulslógirnar ........................................ 2
- Sekt eftir § 104 í skattalógini ........................................ 1
- Meirvirðisgjald ........................................ 214
  (- Mál um skrásetingargjald telja 207)
- Skrásetingargjald á motorakførum ........................................ 6
- Tollur og onnur avgjøld ........................................ 2

Í alt ........................................ 236



| Málini vórðu avgreidd soleiðis: | | ( % ) |
|---|---|---|
| • Staðfest | 158 | (66) |
| • Broytt | 37 | (16) |
| • Partvíst broytt | 4 | (2) |
| • Burturfallin / avvíst | 10 | (4) |
| • Heimvíst | 2 | (1) |
| • Kærufreist | 19 | (8) |
| • Uppafturtøka | 6 | (3) |
| Í alt | 236 | |

Býtt á evni vórðu málini avgreidd soleiðis:

Kærur um skatt - 11 í alt:

| | |
|---|---|
| • Staðfest | 4 |
| • Broytt | 1 |
| • Burturfallin / Avvíst | 3 |
| • Kærufreist | 3 |

Kærur eftir stuðulslógunum – 2 í alt:

- Staðfest 2

Kæra um sekt eftir § 104 í skattalógini –1 í alt:

- Staðfest 1

Kærur um meirvirðisgjald – 214 í alt (207 um mvg av skrásetingargjaldi):

- Staðfest 147
- Broytt 35
- Partvís broytt 4
- Heimvíst 1
- Burturfallin / avvíst 5
- Uppafturtøka 6
- Kærufreist 16

Kærur um skrásetingargjald á motorakførum – 6 í alt:

- Staðfest 4
- Broytt 1
- Heimvíst 1
-

Kærur um toll og onnur avgjøld – 2 í alt:

- Burturfallin / avvíst 2

Býtt á myndugleikar vórðu málini avgreidd soleiðis:

Avgerðir hjá TAKS - 226 í alt:

- Staðfestar 151
- Broyttar 35
- Partvís broyttar 4
- Heimvístar 1
- Uppafturtøka 6
- Burturfalnar / Avvístar 10
- Kærufreist 19
-

Avgerðir hjá Kommunalu Skattakærunevndunum – 4 í alt:

- Staðfestar 3
- Broyttar 1

Avgerðir hjá Akstovuni – 6 í alt:

- Staðfestar 4
- Broyttar 1
- Heimvíst 1



Innihaldið í kærunum:
Nevndin hevur avgreitt 236 mál í 2009, og sum tað longu er nevnt, er talið av avgreiddum málum soleiðis nakað væl hægri enn árini frammanundan. Orsøkin til hetta er, at nevndin í 2008 og í 2009 hevur móttikið nógvar kærur um mvg av skrásetingargjaldi, sum eru avgreiddar í 2009.

Tá málini um mvg av skrásetingargjaldi í ávísan mun eru lík hvørjum øðrum, hevur tað verið møguligt at avgreiða tey lutfalsliga skjótt. Løgfrøðiliga eru málini skjótari at fyrireika og avgera enn onnur mál. Viðmerkjast skal tó, at tað skrivstovuarbeiði, sum annars er í samband við hesi mál, er tað sama sum í mun til onnur mál, og málini eru tí tung fyri okkara skipan.

Býtið av kærunum:
Í 2009 vóru 226 kærur um avgerðir hjá TAKS. Talan var um 214 mál um mvg, harav 207 vóru um mvg av skrásetingargjaldi.

Fýra av málunum vóru kærur um avgerðir hjá Kommunalari Skattakærunevnd. Sæð í mun til samlaða talið av avgreiddum málum, var parturin av málum, sum hava verið til viðgerðar hjá Kommunalari Skattakærunevnd, ikki serliga høgt í 2009, og tað er harafturat fallið í mun til 2008, har 9 kærur vóru um avgerðir hjá Kommunalari Skattakærunevndin.

Eins og í 2008 vóru seks av málunum kærur um avgerðir hjá Akstovuni.

Nevnast kann, at stórur partur av avgerðunum vórðu staðfestar. Tó vórðu lutfalsliga fleiri avgerðir broyttar í mun til 2008. Orsøkin til hetta er helst tey nógvu ivamálini, sum hava verið í málunum um mvg av skrásetingargjaldi.

Vísast kann eisini á, at 6 mál hava verið um uppafturtøku í 2006. TAKS hevur heitt á nevndina um at taka upp aftur avgerðir, sum nevndin áður hevur tikið. Talan er um 6 mál, sum eru eins og snúgva seg um mvg av skrásetingargjaldi. Málini um uppafturtøku eru grundað á serlig viðurskifti, sum hava gjørt seg galdandi í mun til hesi mál.

Lutfalsliga stórur partur av málunum í 2009 hava verið um kærufreist. Talan er um 19 mál, og øll mál eru kærur um avgerðir hjá TAKS, sum eru kærdar ov seint. Vart skal gerast við, at frávik er loyvt í 9 av hesum málum, og í flestu førum er hetta grundað á, at kæruvegleiðingin hjá TAKS hevur verið mangulfull.

Annars kann viðmerkjast, at einans 2 mál eru heimvíst til nýggja viðgerð hjá tí myndugleika, sum hevur tikið avgerð, og viðvíkjandi TAKS kann serliga viðmerkjast, at bert 1 av 226 avgerðum er heimvíst til nýggja viðgerð.

Samskiftið við TAKS:
Samskiftið við TAKS hevur verið gott í 2009, og Kærustovnurin hevur ikki nakað at viðmerkja í hesum sambandi.

Samskiftið við Akstovuna:
Samskiftið við Akstovuna hevur verið gott í 2009, og Kærustovnurin hevur ikki nakað at viðmerkja í hesum sambandi.

Viðgerðartíðin:
Miðal viðgerðartíðin var uml. 6 mánaðir í 2009 og er soleiðis longd í mun til 2008, har miðal viðgerðartíðin var góðar 4 mánaðir. Viðmerkjast kann tó, at viðgerðartíð er á sama støði sum í 2007 og árini framandundan.

Viðmerkjast skal eisini, at bert 162 av teimum 236 avgreiddu málum, vórðu avgreidd innan 6 mánaðir. Av hesum vóru 152 mál um mvg av skrásetingargjaldi.

61 mál høvdu eina viðgerðartíð á 6-12 mdr., og 13 mál høvdu eina viðgerðartíð á 12-24 mdr.

Nevnast kann eisini, at miðal viðgerðartíðin fyri kærur um skatt og vanlig mvg-mál var góðar 6 mánaðir, meðan miðal viðgerðartíðin fyri kærur um meirvirðisgjald um mvg av skrásetingargjaldi var góðar 3 mánaðir.

Miðal viðgerðartíðin fyri málini, har Akstovan var avgerðarmyndugleiki, var 5½ mánaði.

Ein miðal viðgerðartíð á 6 mánaðir er hóskandi fyri tey mál, sum Skatta- og avgjaldskærunevndin avgreiðir. Tað hevur verið møguligt at halda viðgerðartíðina á hesum støði, tí málini um mvg av skrásetingargjaldi hava eina styttri miðal viðgerðartíð (3 mdr.) og eru nógv í tali.

Viðgerðartíðin verður tó væntandi longd í 2010, og hon verður møguliga eisini væl longri enn í 2009. Fyri at stytta ta samlaðu viðgerðartíðina av málunum um mvg av skrásetingargjaldi og effektivisera arbeiðið hjá stovninum, hevur stovnurin raðfest hesi mál høgt í 2009 og harvið viðgjørt tey samlað, uttan mun til nær málini eru komin inn. Hetta hevur hinvegin við sær, at viðgerðartíðin fyri onnur mál verður longd, tí stovnurin ikki hevur havt møguleika at fyrireika hesi. Hesi mál verða væntandi avgreidd í 2010 við munandi longri viðgerðartíð enn 6 mdr.”

# 11. Kærunevndin hjá Stuðulsstovninum

## 11.1 Nevndin

Í kærunevndini hjá Stuðulsstovninum sita:

- Birta Biskupstø, løgfrøðingur og formaður
- Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur
- Bjørg Róin, lestrarvegleiðari

## 11.2 Viðgerðarøkið

Kærunevndin hjá Stuðulsstovninum viðger kærur um:

- Avgerðir hjá Stuðulsstovninum um t.d. útbúgvingarstuðul, ferðastuðul ella verkætlanarstuðul.

## 11.3 Frágreiðingin fyri Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum fyri 2009

“Hagtøl fyri 2009 frá Kærunevndini hjá Stuðulsstovninum.

Kærustovnurin hevur viðgjørt hagtølini fyri Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum fyri 2009.

Móttiknar vórðu 16 kærur í 2009. Seks um ferðastuðul til lesandi uttanlands, tríggjar um lestrarstuðul í Føroyum og 7 um útbúgvingarstuðul uttan fyri norðurlond.

Talið av innkomnum kærum var nakað hægri enn í 2008, tá tilsamans ellivu kærur vórðu móttiknar. Talið av kærum um ferðastuðul og lestrarstuðul er á sama støði, sum árið frammanundan. Men leggjast kann til merkis, at talið av kærum um útbúgvingarstuðul uttan fyri norðurlond er hækkað í mun til árini frammanundan og fyllir hetta árið mest í talinum av innkomnum kærum.



Kærunevndin hevði 5 fundir í 2009 og avgreiddar vórðu 14 kærur. Av hesum snúðu 2 seg um lestrarstuðul í Føroyum, 8 um ferðastuðul til lesandi uttanlands og 4 um útbúgvingarstuðul til lesandi uttan fyri norðurlond.

Avgreiðslan av hesum 14 málunum var soleiðis, at 8 av avgerðunum hjá Stuðulsstovninum vórðu staðfestar, 3 vórðu broyttar, 1 varð tikin aftur og 2 fullu burtur, tí Stuðulsstovnurin, eftir at málið varð kært, tók tey upp til nýggja viðgerð.

Miðal viðgerðartíðin í 2009 var 4 mánaðir og 12 dagar. Hetta er nærum hálvan annan mánaða longri enn í 2008, tá miðal viðgerðartíðin var 3 mánaðir. Longda viðgerðartíðin má sigast at vera ein avleiðing av øktum virksemi á stovninum í mun til árið frammanundan. Miðal viðgerðartíðin verður mett at vera heldur long fyri hetta slagið av málum og stremba verður eftir at stytta viðgerðartíðina.

Samskiftið við Stuðulsstovnin hevur gingið væl, og Kærustovnurin hevur ikki nakað at viðmerkja í hesum sambandi."

# 12. Kærunevndin í lendismálum

## 12.1 Nevndin

Í Kærunevndini í lendismálum sita:
- Marjun Magnussen, løgfrøðingur og formaður
- Jens Wang, løgfrøðingur
- Birgit Hansen, verkfrøðingur
- Óla Jákup Guttesen, byggimeistari
- Tórálvur Weihe, arkitektur

## 12.2 Viðgerðarøkið

Kærunevndin í Lendismálum viðger kærur um:
- Avgerðir hjá kommununum eftir býarskipanarlógini ella byggisamtykt
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um matrikulering og sundurbýti
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir tinglýsingarlógini
- Avgerðir hjá kommunum eftir 1881-lógini um ognartøku
- Avgerðir eftir lóg um eigaraíbúðir

## 12.3 Frágreiðingin fyri Kærunevndina í lendismálum fyri 2009

"Hagtøl fyri 2009 frá Kærunevndini í lendismálum.

Føroya Kærustovnur er skrivstova hjá Kærunevndini í lendismálum. Kærustovnurin hevur gjørt upp tølini fyri virksemið hjá Kærunevndini í lendismálum fyri 2009 og gevur her sína frágreiðing.

Kærur móttiknar í 2009:
Í 2009 móttók Kærustovnurin 27 kærur innan lendismál. Í 2008 mótók Kærustovnurin 33 kærur. Eftir evni býttu málini seg soleiðis:

| | 2009 | 2008 |
|---|---|---|
| Byggimál | 16 | 22 |
| Matrikulering | 3 | 8 |
| Tinglýsing | 1 | 2 |
| Ognartøka | 5 | 1 |

Tað eru framvegis mest kærur í byggimálum. Í 2009 komu fleiri ognartøkumál inn, hesi mál er partur í kommunalari ognartøku í sambandi við útstykking í Klaksvík.



Kærumál avgreidd í 2009:
Kærunevndin í lendismálum hevði hetta árið 11 fundir og avgreiddi 32 mál. Í 2008 vóru 8 fundir og 34 avgreidd mál. Eftir evni býttu málini seg soleiðis:

| | 2009 | 2008 |
|---|---|---|
| Byggimál | 21 | 25 |
| Matrikulmál | 6 | 6 |
| Tinglýsing | 1 | 1 |
| Ognartøka | 4 | 2 |

Viðvíkjandi býtinum millum ymisku evnini eru tað eins og undanfarin ár.

Málini vórðu avgreidd soleiðis:

| | 2009 | 2008 |
|---|---|---|
| Kærda avgerðin staðfest | 12 | 9 |
| Kærda avgerðin broytt | 2 | 5 |
| Kæran heimvíst til nýggja viðgerð | 7 | 2 |
| Kæran avvíst | 3 | 12 |
| Kæran burturfallin | 4 | 3 |
| Avgerðir um steðgandi virknaða | 2 | 2 |
| Avgerð um kærufreist | 2 | 0 |
| Avgerð um at nokta uppafturtøku | 0 | 1 |

Um hugt verður eftir øllum málunum, so eru fleiri staðfestingar og færri broyttar avgerðir í 2009 enn í 2008. Tó vóru fleiri heimvísingar.

Kærur um byggimál – 21 í alt:

| | 2009 | 2008 |
|---|---|---|
| • Avgerðin staðfest | 3 | 7 |
| • Avgerðin broytt | 2 | 4 |
| • Avgerðin heimvíst til nýggja viðgerð | 6 | 2 |
| • Avgerð um at játta steðgandi virknaða | 2 | 1 |
| • Avgerð um at nokta steðgandi virknaða | 0 | 1 |
| • Kæran avvíst | 3 | 7 |
| • Kæran burturfallin | 4 | 2 |
| • Kæra afturkallað | 1 | 0 |
| • Avgerð um at nokta uppafturtøku | 0 | 1 |

Viðmerkt verður, at talan er um fleiri kommunur, tí er trupult at gera viðmerkingar og samanberingar um gongdina.

Kærur um matrikulmál – 6 í alt:

| | 2009 | 2008 |
|---|---|---|
| • Avgerð staðfest | 5 | 2 |
| • Kæran burturfallin | 1 | 1 |
| • Kæra avvíst | 0 | 3 |

Kærur um ognartøkumál – 4 í alt:

| | 2009 | 2008 |
|---|---|---|
| • Avgerð staðfest | 4 | 0 |
| • Kæra avvíst | 0 | 2 |

Í 2009 viðgjørdi kærunevndin 4 mál um ognartøku til eina útstykking í Klaksvík.

Kærur um tinglýsing – 1 íalt:

| | 2009 | 2008 |
|---|---|---|
| • Avgerðin heimvíst til nýggja viðgerð | 1 | 0 |
| • Avgerðin broytt | 0 | 1 |

Viðgerðartíðin:
Samlaða miðal viðgerðartíðin í 2009 var 7 mánaðir og 12 dagar. Samlaða miðal viðgerðartíðin var 5 mánaðir og 18 dagar í 2008. Viðgerðartíðin er sostatt longd við uml. 2 mánaðum í 2009. Hetta kemst av, at Kærustovnurin hevur eisini fingið fleiri nevndir at umsita, og sostatt verður arbeiðstrýstið størri hjá løgfrøðinginum.
Tað hevur eisini víst seg at taka langa tíð at fáa málini lýst. Hetta kemst av, at tað koma nógvar viðmerkingar frá bæði kærarum og myndugleikum. Tað eru serliga byggimálini, sum taka langa tíð. Hetta kemst av, at tað eisini eru fleiri partar í málunum, t.d. grannar. Eisini hava nøkur mál verið fyri nevnd einar 2 ferðir, áðrenn tey eru vorðin endaliga avgreidd.

Mett verður, at viðgerðartíðin kann styttast eitt sindur, og í 2010 verður strembað eftir at stytta um viðgerðartíðina.

Samskiftið við kommunurnar:
Miðal ummælistíðin hjá kommununum hevur verið 2 mánaðir og 13 dagar. Samskiftið við Tórshavnar kommunu gongur eitt sindur trekt, og tað tekur langa tíð at fáa upplýsingar, men tey eru blivin betur til at biðja um longda freist. Samskiftið við hinar kommununar gongur sum heild væl.

Samskiftið við Umhvørvisstovuna:
Miðal ummælistíðin hjá Umhvørvisstovuni var 2 mánaðir og 5 dagar. Mett verður, at ummælistíðin hjá Umhvørvisstovuni hevur verið í lagi í 2009.

Kærur til Løgtingsins umboðsmann:
Tað vóru tvær klagur til Umboðsmannin í 2009 um niðurstøður/avgerðir hjá Kærunevndini í lendismálum. Ta einu klaguna hevur umboðsmaðurin avvíst, og hina klaguna hevur Umboðsmaðurin valt at taka upp til viðgerðar. Niðurstøða er ikki komin í hesum málinum enn.”

# 13. Vinnukærunevndin

## 13.1 Nevndin

Tá avgerðir skulu takast í einstøkum kærumálum, eru í Vinnukærunevndini tríggir ella fimm limir. Formaðurin ella næstformaðurin og tveir limir við serkunnleika á viðkomandi øki. Í serligum førum eru fýra limir við serkunnleika.

- Thomas Magnussen, løgfrøðingur er formaður
- Gurið Joensen, løgfrøðingur er næstformaður

Limirnir við serkunnleika eru:

- Ebba Mortensen, serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsumhvørvislógini,
- Róðin Mellemgaard, serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsumhvørvislógini,
- Jan Sørensen, serkønur limur viðvíkjandi alilógini
- Ari Johanneson, serkønur limur viðvíkjandi alilógini
- Laila Mortensen, serkønur limur viðvíkjandi lóg um tryggingarvirksemi
- Ole Haugaard Nielsen, serkønur limur viðvíkjandi lóg um tryggingarvirksemi
- Sigurð Ó. Vang, serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini
- Hermann Oskarsson, serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini
- Brynleif Poulsen, serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðaralógini
- Pauli Ellefsen, serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðaralógini
- Jákup Mørkøre, serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini, djórasjúkulógini og lóg um djóralæknavirksemi
- Ole Jürgens, serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini, djórasjúkulógini og lóg um djóralæknavirksemi
- Niels Terkelsen, serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini, djórasjúkulógini og lóg um djóralæknavirksemi
- Palli Mortensen, serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini
- Jón Kragesteen, serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini
- Boði Haraldson, serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir
- Pætur Joensen, serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir
- Knud Erik Skovby, serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Sigurjón Ingvason, serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini og lóg um postvirksemi
- Rannvá Sólheim, serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Una Joensen, serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Bergur í Garði, serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi



## 13.2 Viðgerðarøkið

Vinnukærunevndin viðger kærur um:

- Avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir Partafelagslógini, Smápartafelagslógini, Ársroknskaparlógini, Lóg um ávís vinnurekandi virkir, Lóg um vinnurekandi grunnar, Lóg um løggildar og skrásettar grannskoðarar og Lóg um vinnu
- Avgerðir hjá Arbeiðseftirlitinum eftir lógini um arbeiðsumhvørvi
- Avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir lóg um fjarskifti
- Avgerðir hjá Kappingarráðnum eftir lóg um kapping
- Avgerðir hjá Landsverk eftir lógini um landsvegir og lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál
- Avgerðir hjá Akstovuni eftir lógini um ferðslu
- Avgerðir hjá Posteftirlitinum eftir lóg um postvirksemi
- Avgerðir hjá Elveitingareftirlitinum eftir lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- Avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum eftir lóg um Tryggingarvirksemi
- Avgerðir hjá Heilsfrøðiligu Starvsstovuni eftir Lóg um matvørur, Lóg um djórasjúkur, Lóg um djóralæknavirksemi, Lóg um aling av fiski, og Lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum

## 13.3 Frágreiðingin fyri Vinnukærunevndina fyri 2008 / 2009

“Frágreiðing um Vinnukærunevndina 2008 / 2009

Kærustovnurin hevur gjørt upp tølini fyri virksemið hjá Vinnukærunevndini, frá tí hon byrjaði í 2008 til ársenda 2009.

Móttiknar kærur:
Í tíðarskeiðnum fram til 31. desember 2009 hevur Vinnukærunevndin móttikið 35 kærur.

Býtið av móttiknum kærum, býtt á myndugleikar, er soleiðis:

- Skráseting Føroya......4
- Landsverk......6
- Arbeiðseftirlitið......1
- Akstovan......9
- Heilsufrøðiliga Starvsstovan......9
- Posteftirlitið......2
- Fjarskiftiseftirlitið......2
- Kappingarráðið......1
- Tryggingareftirlitið......1

Í alt......35

Tað sæst, at kært er um avgerðir hjá øllum myndugleikunum, hvørs avgerðir kunnu kærast til Vinnukærunevndina, uttan avgerðir hjá Elveitingareftirlitinum. Flestu kærurnar hava verið viðvíkjandi Heilsufrøðuligu Starvsstovuni og Akstovuni.

Avgreiddar kærur:
Avgreidd vórðu tilsamans 26 mál í tíðarskeiðnum fram til ársenda 2009.

Kærumálini, sum vórðu avgreidd í hesum tíðarskeiðnum, býttu seg eftir myndugleika soleiðis:

- Skráseting Føroya......4
- Landsverk......3
- Arbeiðseftirlitið......1
- Akstovan......7
- Heilsufrøðiliga Starvsstovan......7
- Fjarskiftiseftirlitið......2
- Kappingarráðið......1
- Tryggingareftirlitið......1

Í alt......26

Málini vórðu avgreidd soleiðis:

| | |
|---|---|
| • Avgerðin hjá myndugleikanum staðfest | 5 |
| • Avgerðin hjá myndugleikanum broytt | 3 |
| • Kæran fall burtur | 6 |
| • Kæran varð avvíst | 12 |
| Í alt | 26 |

Skráseting Føroya
3 av avgerðunum vóru staðfestar og 1 fall burtur.
Tær tríggjar staðfestu avgerðirnar vóru eftir lóg um løggildar og skrásettar grannskoðarar. Ein kæra fall burtur, tí kærarin bert hevði sent inn fyribilskæru fyri at avbróta kærufreistina, men vendi ongantíð aftur við meira.

Landsverk
1 avgerð varð staðfest og 2 avvístar.
Avgerðin, sum varð staðfest, var eftir lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál. Tvær kærur vóru avvístar, tí tær vóru ikki mettar at vera fevndar av málsræðinum hjá Vinnukærunevndini.

Arbeiðseftirlitið
1 kæra avvíst, tí viðkomandi var ikki mettur at hava slíkan týðandi individuellan áhuga í málinum, at hann hevði rætt at kæra.

Akstovan
1 avgerð varð staðfest, 2 vórðu broyttar, 3 vórðu avvístar og 1 fall burtur.
Staðfesta avgerðin og báðar broyttu avgerðirnar vóru eftir kunngerð nr. 112 frá 29. september 2005 um koyrikort og koyrifrálæru. 3 kærur vóru avvístar, tí talan var ikki um avgerðir, sum myndugleikin hevði tikið, men heldur kærur um virksemið hjá myndugleikanum. 1 kæra varð afturkallað, áðrenn nevndin fekk tikið støðu.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan
1 avgerð varð broytt, 4 avvístar og 2 fullu burtur.
1 av kærunum var viðvíkjandi avgerð eftir lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum. Henda varð avvíst, tí kært var ov seint.

Hinar kærurnar vóru viðvíkjandi matvørulógini. 3 av hesum kærum vórðu avvístar, tí málini vóru ikki fevnd av málsræðinum hjá nevndini. Talan var um kærur frá áðrenn málsøkið varð lagt til Vinnukærunevndina.

Tvey mál fullu burtur. Annað eftir at tað á fundi í nevndini kom fram, at partar av málinum vóru loystir, og partarnir vóru í dialogi hvør við annan við tí endamáli at finna skynsamar loysnir, har full semja ikki var. Hitt málið fall burtur, eftir at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevði verið á nýggjari eftirlitsvitjan og í hesum sambandi hevði tikið nýggja avgerð.

Avgerðin, sum varð broytt, snúði seg um virknaðin av, at mál hevur uppsetandi virknaða. Niðurstøðan hjá Vinnukærunevndini í hesum máli var, at týdningurin av, at kæra hevur uppsetandi virknaða, bert forðar Heilsufrøðiligu starvsstovuni í verki at fremja avgerðina um at taka løggildingina aftur, meðan kæran verður viðgjørd. Uppsetandi virknaðurin setir tó ikki Heilsufrøðiligu starvsstovuni forboð fyri at endurskoða málið / tiknu avgerðina ella at fremja nýtt eftirlit á virkinum.

Mett verður, at við at fáa greiðu á, at hóast mál er kært, so ber til framvegis at arbeiða við at finna loysnir, kann roknast við, at nógv mál fáa eina loysn, áðrenn tey verða løgd fyri nevndina til avgerðar.

Fjarskiftiseftirlitið
Báðar kærurnar fullu burtur. Annað málið tí gongd var enn í viðgerðini hjá myndugleikanum. Hitt málið afturkallaði kærarin. Í seinna málinum hevði Vinnukærunevndin frammanundan tikið avgerð um at nokta kæruni uppsetandi virknaða.

Kappingarráðið
Kæran varð avvíst, tí kærarin varð ikki mettur at hava týðandi og individuellan áhuga í málinum og hevði tí ikki rætt at kæra.

Tryggingareftirlitið
Kæran varð avvíst, tí kærarin rindaði ikki fyri kæruviðgerðina.

Gjald fyri kærur:
Vísandi til § 7 í kunngerð nr. 78 frá 28. august 2008 um vinnukærunevnd er gjald ásett fyri viðgerð av ávísum kærum til Vinnukærunevndina. Kostnaðurin fyri kæruviðgerð er settur til kr. 4.000, uttan tá kæran viðvíkur viðurskifti, ið ikki hava samband við tað aktuella ella framtíðar vinnuvirksemið hjá viðkomandi, ið kærir. Í slíkum førum er kostnaðurin 2.000,- kr.

Í tíðarskeiðnum fram til ársenda 2009 er gjald á kr. 4.000 rindað 5 ferðir, og gjald á kr. 2.000 rindað 3 ferðir. Av hesum eru kr. 2.000 afturgoldnar, tí málið varð avvíst.

Samskiftið við myndugleikarnar:
Sum heild má samstarvið við myndugleikarnar sigast at hava gingið væl, og vit hava fingið tey skjøl og frágreiðingar, sum biðið er um og innan rímiliga tíð.

Viðgerðartíðin:
Miðal viðgerðartíðin fyri øll avgreidd mál hjá Vinnukærunevndini í hesum tíðarskeiði var 3½ mánaðir. Longsta viðgerðartíðin vardi 14 mánaðir, og stytsta viðgerðartíðin var 2 dagar.

Vart skal tó gerast við, at miðal viðgerðartíðin er ávirkað av lutfalsliga stóra partinum av avvístum málum. 12 av 26 málum endaðu við eini avvísing. Vanliga ber rættiliga skjótt til at staðfesta, at kæra ikki er fevnd av málsøkinum hjá nevnd, og hava hesi mál tí ofta eina serliga stutta viðgerðartíð. At so stórur partur av kærunum eru avvístar er nakað, sum serliga ger seg galdandi í byrjanini, tá nýggj nevnd fer til verka. Mett verður, at tað tí ivaleyst gevur eina rættari mynd av viðgerðartíðini í hesum tíðarskeiði ikki at taka avvístu málini við í hesa meting.

Miðal viðgerðartíðin er 6 mánaðir, tá avvístu málini verða tikin burturúr.

Roynt verður sjálvandi altíð at stytta viðgerðartíðina so nógv sum til ber, men ein miðal viðgerðartíð á 6 mánaðir verður mett at vera hóskandi fyri hetta slagið av málum.

Val av serkønum nevndarlimum.
At enda skal vart gerast við, at á flestu økjum eru enn bert tveir serkønir limir valdir til Vinnukærunevndina.

Lógin leggur upp til, at formaðurin tilnevnir 2 til 4 serkønar limir at viðgera málini. Men tá tað í flestu førum bert eru valdir tveir serkønir limir á hvørjum øki, er tilnevning formansins meiri formlig enn reell. Mælt verður til, at í minsta lagi 4 serkønir limir verða valdir til økini, eisini fyri at vera upp á forkant, um talan skuldi verið um gegnistrupulleikar.“

# 14. Psykiatriska sjúklingakærunevndin

## 14.1 Nevndin

Í Psykiatrisku sjúklingakærunevndini sita:

- Nella Festirstein, løgfrøðingur og formaður í nevndini
- Kaj Kallsberg, fyrrv. kommunulækni
- Sámal Lindenskov, sálarsjúkrarøktari

## 14.2 Viðgerðarøkið

Kærast kann til psykiatrisku sjúklingakærunevndina, um persónur í samband við innlegging á psykiatriska deild verður útsettur fyri tvingsli.

## 14.3 Frágreiðingin fyri Psykiatrisku sjúklingakærunevndina fyri 2009

“Hin 1. oktober 2009 kom nýggja Psykiatrilógin í gildi, og við henni er rættartrygdin hjá føroysku sjúklingunum á sama støði sum í hinum norðanlondunum. Sum nakað nýtt kunna sjúklingar kunna nú kæra tvingsilsinntriv til eina kærunevnd og fáa tilnevnt ein sjúklingaráðgeva.

Psykiatrilógin byggir á tað grundsjónarmið, at tvingsil í samband við innlegging, uppihald og viðgerð á psykiatriskari deild eigur at verða fyribyrgt og sloppið undan so vítt tað yvirhøvur ber til. Hinvegin ber ikki til at sleppa heilt undan tvingsli á hesum økinum. Tað er sambært lógini loyvt at brúka ymisk sløg av tvingsli, tá ið serlig viðurskifti tala fyri tí. Til dømis tvingsilsinnlegging, tvingsilsafturhald á deildini, tvingsilsviðgerð, brúk av tvingsils-fastspenning og brúk av kropsligari megi (t.e. at starvsfólk halda sjúklinginum føstum). Stóra framstigi í rættartrygdini hjá sjúklinginum er, at ein týðandi partur av lógini inniheldur eina røð av ásetingum, ið hava sum endamál at avmarka ella, um til ber, at fyribyrgja nýtslu av tvingsli.




Psykiatriska sjúklingakærunevndin skal sum meginreglu hava tikið avgerð um kæruna innan 7 gerandisdagar aftaná at kæran er móttikin. Sjúklingakærunevndin viðger kærur um t.d. tvingsilsinnlegging, tvingsilsafturhald á deildini, tvingsilsviðgerð, brúk av tvingsilsfastspenning og brúk av kropsligari megi.

Skipanin við sjúklingaráðgevum skal tryggja, at psykiatriskir sjúklingar, sum vera lagdir undir tvingsil, fáa rætt til stuðul og hjálp, bæði menniskjaliga og rættarliga frá óheftum persóni, ið hava neyðuga førleikan. Allir sjúklingar, sum eru undir tvingsilsfyriskipanum, fáa tilnevnt ein sjúklingaráðgeva. Uppgávan hjá sjúklingaráðgevanum er at vitja sjúklingin, og hava støðugt samband við hann. Ráðgevin skal leiðbeina og geva ráð í øllum viðvíkjandi innlegging, uppihaldi og viðgerð á psykiatrisku deild. Harumframt skal hann hjálpa sjúklinginum við møguligari kæru og vera hjástaddur, tá ið kæran verður viðgjørd í kærunevndini.

Føroya Kærustovnur er fyrisiting hjá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini. Hetta inniber, at Kærustovnurin fyrireikar fundir og kærumál, og ger løgfrøðilig tilmæli til nevndina at taka støðu til. Harumframt finnur Kærustovnurin fram til og góðkennir sjúklingaráðgevar og kunnar teir um psykiatrilógina og uppgávur teirra.

Virksemið í 2009

Føroya Kærustovnur lýsti eftir sjúkligaráðgevum til psykiatriska øki, og vóru 16, ið fegin vildu verða sjúklingaráðgevar.

Avgjørt var at góðkenna 5 av umsøkjarunum til sjúklingaráðgevar, og síðani fingu hesir undirvísing í psykiatrilógini á Kærustovninum.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin byrjaði hin 1. oktober 2009, tá ið Psykiatrilógin kom í gildið.

Kærunevndin hevur hildið 2 fundir, 3 kærur eru móttiknar og har av eru 2 avgreiddar. Tá ið kært verður til psykiatrisku kærunevndina, innihalda kærurnar oftani ymisk tvingsilsinntriv ið kært er um

Kærumálini, sum vórðu avgjørd, vóru av hesum slagi:

| | |
|---|---|
| • Tvingsilsfastspenning | 2 |
| • Tvingsilsinnlegging | 1 |
| • Tvingsilsafturhaldan | 1 |
| Í alt | 4 avgerðir |

Kærunevndin avgjørd at staðfesta allar avgerðirnar hjá Psykiatriska deplinum.

Viðmerkingar
Føroya Kærustovnur hevur fingið upplýst frá Psykiatriska deplinum at frá 1. oktober til 31. desember 2009 vóru 12 tvingsilsfyriskipanir tilsamans.

Tvingsilsfyriskipanirnar vóru av hesum slagi:

- Tvingsilsfastspenning 4
- Tvingsilsinnlegging 3
- Tvingsilsafturhaldan 5

Í alt 12 tvingsilsfyriskipanir

Tørvur var á at tilnevna sjúklingaráðgeva var 9 ferð í 2009, soleiðis at allir sjúklingaráðgevar nú aftaná 3 mánaðir hava verið á Psykiatrisku deild og vitjað og ráðgivið sjúklingum, sum vóru undir tvingsli.

Um tølini frá Psykiatriska deplinum verða samanborin við talið á kærum sæst, at hóast sjúklingurin fær ráðgeving frá sjúklingaráðgevanum, har upplýst verður um møguleikan at kæra tvinsilsfyriskipanina, eru bert tey fáu, ið hava valt at kæra í 2009.

Samskiftið við Psykiatriska depilin hevur gingið gott, og eingir trupulleikar hava verði við at fáa neyðug skjøl í sambandi við viðgerð av kærumálum. Eisini hevur uppmøtingin til fundin hjá kærunevndina verði góð, bæði frá starvsfólkum á Psykiatrisku deild og frá sjúklingaráðgevunum.”



# 15. Skuldarumskipanarnevndin

## 15.1 Nevndin

Í Skuldarumskipanarnevndini sita:

- Ingi Højgaard, advokatur og formaður í nevndini
- Ulla Joensen, cand. merc.
- Súsanna Leo, cand. jur.

## 15.2 Viðgerðarøkið

Nevndin viðger umsóknir um umskipan av almennari skuld.

## 15.3 Frágreiðingin fyri Skuldarumskipanarnevndina fyri 2009

"Viðvíkjandi gongdini í málunum um skuldarumskipan í 2009.
Kærustovnurin hevur nú gjørt upp tølini fyri virksemið hjá Skuldarumskipanarnevndini í 2009.

Í 2009 komu 30 mál inn. 28 mál vórðu avgreidd hjá Skuldarumskipanarnevndini í 2009. Við ársskiftið 2009/2010 lógu 20 mál undir avgreiðslu/fyrireiking.

Uppbýtt eftir skuldarslag, vóru innkomnu málini hesi:

- Ymisk skuld ........ 8
- Skattaskuld ........ 9
- Mvg ........ 3
- Tollur ........ 0
- Vinnulán og veðhaldslán ........ 0
- Lestrarlán ........ 5
- Rentur av skattaskuld ........ 5

Í alt ........ 30

Viðmerkjast skal, at í 2009 komu ongar umsóknir inn í bólkinum vinnu- og veðhaldslán, framleiðslugjald, tollur, AM-gjald og lønarhæddaravgjald.

Uppbýtt eftir skuldarslagi vórðu avgreiddu málini hesi:

- Ymisk skuld ........ 6
- Skattaskuld ........ 8
- Mvg ........ 3
- Tollur ........ 0
- Vinnulán og veðhaldslán ........ 0
- Lestrarlán ........ 4
- Rentur av skattaskuld ........ 6

Skuldarumskipanarnevndin hevði 4 fundir í 2009, og vórðu 28 mál avgreidd.

Málini vórðu avgreidd soleiðis:

- Samtykt at ganga umsóknini á møti við eftirgevan fult ella partvíst. ........ 8
- Víst á møguleikan at søkja um "gældssanering" gjøgnum Skiftirættin, ella privata loysn ........ 3
- Játtað at steðga rentutilskriving ........ 1
- Samtykt ikki at ganga umsóknini á møti – treytir fyri skuldarumskipan ikki loknar ........ 3
- Gjaldsskipan játtað ........ 3
- Avvíst, manglandi heimild til útgjald ........ 1
- Burturfallin (t.d. tí umsøkjarin ikki kom við neyðugum upplýsingum) ........ 9

Eftirgivin skuld:

Skuldarumskipanarnevndin eftirgav í alt umleið kr. 5.976.055,00 í 2009. Skuldin er uppbýtt soleiðis:

- Rentuskuld, uml.kr. 3.940.152,00
- Vinnu- og veðhaldslán, uml.kr. 0,00
- Lestrarlán, uml.kr. 0,00
- Mvg-skuld, uml.kr. 214.211,00
- Landsskattur, uml.kr. 1.821.692,00

Tað er torført at seta upp nágreinilig tøl um eftirgevingar, tí ymiskar umstøður gera, at tølini ofta broytast eitt sindur. Rentuskuldin broytist t.d. alla tíðina. Hini tølini kunnu vera broytt eitt sindur, frá tí at umsóknin kom inn, til avgerðin varð tikin av nevndini.

Í málunum, har nevndin hevur samtykt ikki at ganga umsóknini á møti, hevur talan í nógvum føri verið um mál, at skuldin er lítil sæð í mun til ogn og inntøku hjá persóninum, ella at umsøkjarin hevur havt frívirði í fastari ogn. Taks hevur eisini í nøkrum førum trygt veð fyri skuldini.

Viðgerðartíðin:
Miðal viðgerðartíðin í 2009 var 6 mánaðir og 5 dagar. Miðal viðgerðartíðin fyri 2008 var 5 mánaðir og 28 dagar. Sostatt er viðgerðartíðin longd við nøkrum døgum í 2009. Viðmerkt verður, at í 2009 hevði Skuldarumskipanarnevndin bert 4 fundir, og hetta nokk er við til at leingja um viðgerðartíðina.

Ummælistíðin hjá Taks var í miðal 27 dagar. Viðgerðartíðin hjá kommununum var í miðal 4 mánaðir og 6 dagar. Her verður viðmerkt, at miðal viðgerðartíðin hjá Tórshavnar kommunu var 5 mánaðir og 11 dagar, meðan miðalviðgerðartíðin hjá hinum kommununum var 1 mánaði og 10 dagar. Stuðulsstovnurin hevði eina miðalviðgerðartíð uppá 14 dagar.

Samskiftið við myndugleikarnar:
Kærustovnurin hevur havt samskifti við Taks, Stýrið í samband við upplýsingina av málunum, og við Stuðulsstovnin, tá talan er um lestrarlán. Mett verður, at hetta samskiftið hevur gingið væl. Upplýsingargongdin er komin í eina fasta legu.

Kommunurnar taka avgerð um kommunuskattaskuld. Mett verður, at tað tekur ov langa tíð hjá Tórshavnar kommunu at taka avgerð um kommunuskattaskuld. Ynskiligt hevði verið, at hesi málini vórðu avgreidd eitt sindur skjótari.

Tað vóru bara tvey mál hjá øðrum kommunum, og tey málini tóku munandi stytri tíð.

Viðmerkingar:
Kærustovnurin fer enn einaferð at vísa á, at viðgerðarmannagongdin, sum er neyðug fyri at fylgja ásettu lógarkrøvunum fyri skuldarumskipan, er tung, og virkar nakað stirvin, tá talan er um minni skuld. Mett verður, at skipanin hevði verið meira fleksibul og léttari at umsitið, um t.d. Taks hevði heimild at eftirgivið minni upphæddir, og at gjørt rentufríar gjaldsavtalur av skuld upp til t.d. kr. 50.000,00.

Ein persónur kærdi avgerðina um eftirgeving til Løgtingsins umboðsmann í 2008. Løgtingsins umboðsmaður kom við eini niðurstøðu tann 22. apríl 2009. Umboðsmaðurin heitti á nevndina um at taka málið uppaftur av nýggjum. Málið er í løtuni undir fyrireiking at leggja fyri nevndina til avgerðar.”

www.kaerustovnur.fo

Føroya Kærustovnur er óheftur stovnur undir Innlendismálaráðnum. Stovnurin fyrireikar kærumál til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina, Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum, Kærunevndina í Lendismálum, Vinnukærunevndina og Psykiatrisku Sjúklingakærunevndina. Harumframt er Kærustovnurin skrivstova hjá Skuldarumskipanarnevndini og Fjølmiðlanevndini.
Á stovninum starvast í løtuni 7 fólk; stjórin, tríggir løgfrøðingar og trý skrivstovufólk.

Føroya Kærustovnur | Undir Hornabakka | Postsmoga 45 | 110 Tórshavn
Telefon 32 05 85 | Telefax 32 05 90 | www.kaerustovnur.fo